Vansorgan meiri vanlig

– Trupulleikarnir, sum síggjast í Havn, koma spakuliga út á bygd. Vit síggja, at heimið ikki í nóg stóran mun átekur sær uppgávuna og skylduna tað eigur yvir fyri barninum, sigur Suni í Hjøllum, skúlastjóri í Fuglafirði

VANSORGAN
Turið Kjølbro

Fuglafjarðar skúli og skúlastýrið á staðnum skipa mikukvøldið fyri áhugaverdum fundi um vansorgan. Vansorgan merkir vantandi umsorgan, umsorganarsvík ella danska omsorgssvigt. Fundurin verður skipaður sum pallborðsfundur, har Sólrun Jacobæus, fyrrverandi leiðari á Føroya Barnaheimi, og Karin Kjølbro, leiðari á Kriminalforsorgini, leggja fyri. Spurningarnir, sum eitt nú verða umrøddir, eru, hvat vansorgan er, hvussu støðan í Føroyum er, hvør eigur ábyrgdina at hjálpa, tá ið talan er um vansorgan, og hvønn leiklut skúlin hevur í hesum sambandi.



– Vit vóna, at foreldur taka ábendingarnar í álvara, umrøða trupulleikarnar í felag og tosa um, hvat vit kunnu gera betur, sigur Suni í Hjøllum, skúlastjóri í Fuglafirði

Seinnu árini hava skúlafólk javnan gjørt vart við, at uppalingarliga skyldan yvir fyri barninum í stóran mun er flutt yvir á skúlan.

– Trupulleikarnir, sum síggjast í Havn, koma spakuliga út á bygd. Vit síggja, at heimið ikki í nóg stóran mun átekur sær uppgávuna og skylduna tað eigur yvir fyri barninum, sigur Suni í Hjøllum, skúlastjóri í Fuglafirði.

Gott samstarv millum skúla og heim er ein fortreyt fyri, at barnið fær eina góða skúlagongd. Ein onnur avgerandi fortreyt er, at foreldur stuðla barninum í gerandisdegnum og innlæringini.

– Skúlin væntar av næminginum, at hann møtir til tíðina, er úthvíldur, hevur matpakka við og er til reiðar at taka ímóti undirvísingini. Nógv teir flestu næmingarnir liva upp til hetta, men eitt vaksandi tal av næmingum haltar afturúr, tí heimið ikki ger sína skyldu mótvegis barninum, sigur Suni í Hjøllum.

– Vit vænta eisini av næminginum, at hann vísir umsorgan, ábyrgdarfulla sosiala atferð, og sámiligan málburð í samskiftinum við lærarar og næmingar. Av foreldrunum vænta vit, at tey eru til reiðar at fara inn í eitt skapandi og mennandi samstarv við skúlan, og at tey kenna ábyrgd fyri børnum sínum, tá ið tað snýr seg um spurningar so sum seksualupplýsing, royking, alkohol og onnur rúsevni, sigur Suni í Hjøllum.

Í Fuglafjarðar skúla ganga børn úr Leirvík, Gøtu og Fuglafirði í framhaldsdeildini. Framhaldsdeildin á skúlanum er sostatt millum størstu í landinum við umleið 160 næmingum.

– Við fundinum vóna vit, at foreldur taka ábendingarnar í álvara, umrøða trupulleikarnar í felag og tosa um, hvat vit kunnu gera betur. Eru trupulleikar, mugu vit tosa um teir, tí ofta síggja vit at teir verða tagdir burtur, sigur Suni í Hjøllum.

Seinnu árini hevur Fuglafjarðar skúli skipað fyri áhugaverdum fundum við góðari uppmøting frá foreldrum. Mikukvøldið verður høvi hjá fólki at seta spurningar og verða við í orðaskiftinum eftir framløguna. Á skránni er eisini sangur, tónleikur og kaffimunnur.

Eingin bati at hóma

Gylt orð og hátíðarlig lyfti síggjast ikki nóg væl aftur á komandi fíggjarlóg, tí psykiatriska økið fær aftur ov lítla játtan

SINNISBATI
Turið Kjølbro

Hví skulu tey sálarsjúku bíða ár eftir ár eftir at fáa sømilig kor. Hendan spurningin og aðrar reisir felagið Sinnisbati politisku myndugleikunum, nú enn eina ferð er greitt, at ov lítið er sett av á fíggjarlógini til tey sálarsjúku.

Umstøðurnar hjá teim sálarsjúku eru kendar. Álit er skrivað, sum nágreiniliga lýsir støðuna, við niðurstøðu og tilmælum. Umleið 40 fólk liggja inni á landssjúkrahúsinum, sum kundu verið útskrivað, men sum ongan bústað hava at fara í. Og 40 onnur búgva uttanfyri sjúkrahúsið, men sum eisini tørva ein líkinda bústað.

– Ábyrgdina av at útvega okkara sálarsjúku hóskandi bústað liggur á landsins myndugleikum, sigur Sinnisbati.

Skulu hesi nógvu fólkini hava eina vón um, at teirra bráðfeingis bústaðartørvur verður nøktaður í eini framtíð, sum ikki liggur so langt burturi, skulu nógv fleiri pengar setast av á fíggjarlógini. Á fíggjarlógini í ár eru 3,5 mió. krónur tøkar til bygging av bústøðum til sálarliga sjúk. Á komandi fíggjarlóg eru settar av 4 mió. krónur til sama endamál. Men veruleikin er, at kostnaðurin av einum húsi til 10 fólk er umleið 10-12 mió. krónur. Við øðrum orðum: tey 40 fólkini, sum liggja á psykiatrisku deildunum á landssjúkrahúsinum og bíða eftir at sleppa út í annan bústað, mugu bíða 12 ár afturat. Og tá eru onnur komin aftrat teimum. Skal nakað muna, mugu í minsta lagi 10 mió. krónur setast av á fíggjarlógini fyri komandi ár.

Fyri lítlum ári síðani skipaði felagið Sinnisbati fyri einum almennum pallborðsfundi um viðurskifti teirra sálarsjúku. Við borðið sótu fleiri av fremstu viðgerðarfólkum á sálarliga økinum, saman við heilsumálaráðharranum og umboðum fyri Sinnisbata. Stóri íbúðartørvur teirra sálarliga sjúku varð viðgjørdur. Umboð fyri allar politiskar flokkar vóru hjástødd, og vissaðu um, at teirra flokkur fór at gera sítt til at hjálpa upp á støðuna. Við støði í hesum fundi, setti heilsumálaráðharrin eina nevnd at kanna bústaðartørvin hjá teim sálarliga sjúku, og í vár lat nevndin eitt álit úr hondum, kallað »Ein glotti fyri framman«.

Í sama áliti kemur fram, at neyðugt er at ein samskipari verður settur á serforsorgini til at standa fyri ætlaðu framtíðar psykiatriini burturav. Leiðslan á serforsorgini hevur bart út sagt, at tey hava ikki arbeiðsorku at taka sær av øktum virksemi á psykiatriska økinum. Á komandi fíggjarlóg eru ongir pengar settir av til ein slíkan, sum kostar árliga uml. 600.000 krónur við fyrisiting.

– Verður hesin samskiparin ikki settur frá 1. januar 2002, dettur øll ætlanin um framtíðarpsykiastriina á gólvið, sigur Sinnisbati.

Ei heldur eru pengar settir av til virkishús fyri tey sálarsjúku. Bæði álitið og serforsorgin mæla til, at virkishús verður gjørt til tey sálarsjúku, tí at tað er neyðugt at sálarsjúk hava okkurt at fara til, og hava ein innihaldsríkan gerandisdag, eftir at tey eru útskrivað av psykiatrisku deildunum. Serforsorgin ynskti 7 mió. krónur til tey sálarsjúku, men einki er sett av.

Sinnisbati heitir tí á fíggjarnevndina og løgtingið um at kanna hesi viðurskifti, og játta 10 mió. krónur til tey sálarsjúku á fíggjarlógini fyri 2002, og sum heild raðfesta tey sálarsjúku hægri.

21 praktikkvegleiðarar klaktir

PRÓGV
Turið Kjølbro

Fríggjadagin í farnu viku fingu 21 sjúkrasystrar prógv sum praktikkvegleiðarar. Hesar starva allar á sjúkrahúsdeildum, ellis- og røktarheimum, og í heimarøktini. Á hesi stóð fara sjúkrasystralesandi í starvsvenjing og knýttar at teimum hava tær eina sjúkrasystir, sum er teirra vegleiðari.

Nýggju praktikkvegleiðararnir hava tikið eitt skeið, sum hevur vart sjey í vikur.

– Fyrr hevur verið skipað fyri smærri skeiðum fyri vegleiðarar. Hetta langa skeiðið, sum hesar 21 nú hava fingið, ger teirra førleika at vegleiða sjúkrasystrar undir starvsvenjingini munandi betri, sigur Hildur við Høgadalsá, lærari á Sjúkrasystraskúla Føroya.

Hesar 21 sjúkrasystrarnar, sum nú hava fingið prógv sum praktikkvegleiðarar, nøkta ikki tørvin. Tí er eitt nýtt skeið er í umbúna.

Ung í Klaksvík fáa virkishús

VIRKISHÚS
Turið Kjølbro

Fyrst í komandi ári fáa ung í Klaksvík eitt virkishús. Hóskandi høli eru í kikaranum, men enn hevur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, ikki hug at avdúka, hvørji hesi eru. Leiðari verður settur at arbeiða burturav í húsinum.

– Tørvur er avgjørt á einum slíkum húsum fyri ung í aldrinum 14 til 18 ár. Tey, sum íðka ítrótt, hava nógv tilboð í frítíðini. Meðan ung, sum ikki ganga upp í ítrótt, hava ov lítið at taka sær við aftaná skúlatíð og í frítíðini. Ætlanin at gera eitt virkishús er tí væl móttikin bæði av ungum og foreldrum, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

– Ætlanin at gera eitt virkishús er væl móttikin bæði av ungum og foreldrum, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík

Í fíggjarlógini hjá Klaksvíkar kommunu fyri næsta ár eru 200.000 krónur settar av til endamálið. Og fitt av pengum eru tøkir frammanundan.

Umboð fyri Klaksvíkar kommunu hava verið á kunningarferð í Virkishúsinum í Havn. Hugsandi er tí, at tilboðið til tey ungu í Klaksvík verður nøkulunda tað sama, um enn kanska í minni mun.

Føroyskt oljufelag við í oljuleiting utttanlands

Síðani felagið varð stovnað í 1998 hevur tað gingið væl hjá føroyska oljufelagnum Atlantic Petroleum. Felagið er partur av samtakinum The Faroes Partnership, ið hevur fingið tillutað leitiloyvi á føroyskum øki, og nú er tað eisini á veg inn í enskt øki.

FØROYSKT OLJUFELAG GÓÐKENNING
Jan Müller

Føroyska oljufelagið P/F Atlantic Petroleum fer í næstum at víðka um sítt starvsøkið. Felagið hevur fingið góðkenning frá teimum ensku myndugleikunum til at virka á enskum øki. Frammanundan er P/F Atlantic Petroleum partur av samtakinum The Faroes Partnership, ið hevur fingið tillutað loyvi nr. 001 á føroyskum øki. Wilhelm Petersen, stjóri í felagnum, hevur brúkt nógv av síni tíð til at fáa føroyska felagnum góðkenning uttan fyri landoddarnar eisini. Nú hetta er komið uppá pláss er hann sera fegin og sigur, at hetta er ikki minst einum sera effektivum og professionellum DTI fyri at takka og so tí stóra stuðuli, sum føroyska felagið hevur fingið frá sínum partnarum, her ikki minst Amerada Hess og Dong.



Á kortinum síggja vit loyvini, báðumegin markið, sum Atlants Kolvetni er við í

Høvuðsendamálið við stovnanini av felagnum varð at tryggja føroyska luttøku í einari møguligari føroyskari oljuvinnu. Hetta skuldi gerast við at fáa í lag eina samstarvsavtalu við eitt av teimum feløgum ella bólkum, ið søktu um leitiloyvi á føroyskum øki. Treytirnar í samstarvsavtaluni við The Faroes Partnership eru sera góðar fyri Atlantic Petroleum, td. kann nevnast at:

- felagið tekur lut í leitiarbeiðinum við einum ognarparti uppá 0,1%, men hevur møguleika fyri at keypa upp til 5% av loyvinum um leitingin gevur góð úrslit
- felagið hevur møguleika fyri at vera við í øllum leitiarbeiðinum á jøvnum føti við hini feløgini, og kann við hesum ogna sær tann kunnleika og ta vitan ið er neyðug fyri luttøku í oljuleiting og oljuframleiðslu.

Samstarvsfelagarnir hjá Atlantic Petroleum fingu í 19. enska útbjóðingarumfari tillutað 3 loyvir, og við góðkenningini frá ensku myndugleikunum fer felagið nú formelt uppí samarbeiðið hinumegin markið. Atlantic Petroleum hevur longu keypt seg inn í tvey av hesum loyvum, P.1027 og P.1029, sum liggja í blokki 176/20, 204/16 & 21. Hesi loyvi liggja upp at loyvinum hjá The Faroes Partnership í føroyskum øki, og eru sostatt ein náttúrlig víðkan av tí samarbeiði feløgini hava á føroyska sokklinum. Loyvini, ið Atlantic Petroleum nú hevur ein ognarpart í ensku megin markið, eru sera lovandi. Fyrstu boringarnar verða næsta ár.

Wilhelm Petersen sigur, at felagið sær hesa víðkan sum strategiskt sera góða fyri víðari menning. Atlantic Petroleum hevur síðan stovnanina haft ætlanir um trý virkisøkir: oljuleiting á føroyskum øki, oljuleiting í enskum øki, og sum tað triðja ætlar felagið at keypa seg inn í økir, sum eru framleiðandi.

Avtalan viðvíkjandi loyvunum í enskum øki er lík avtaluni í føroyskum øki. Felagið byrjar við einum lítlum ognarparti, og hevur møguleika fyri at økja ognarpartin seinni.

Sovereign Explorer hevur síðan 20. september borað fyrsta brunnin fyri The Faroes Partnership. Hjá Atlants Kolvetni fylgja tey sera væl við og sigur Wilhelm Petersen, at arbeiðið hevur sum heild gingið eftir ætlan, og rokna tey við at verða liðug um miðjan november.

Um The Faroes Partnership finnur kolvetni í føroyskum øki í slíkum nøgdum, at til ber at útvinna tað vinnuliga, hevur Atlantic Petroleum ætlanir um at økja sín ognarpart í loyvinum til 5%. Kostnaðurin av eini útbygging í samband við eitt slíkt fund verður mettur at verða um 10 mia. kr., og við einum 5% ognarparti skal Atlantic Petroleum av við 500 mio. kr. Saman við kostnaðinum fyri at luttaka í loyvunum ensku megin markið kemur Atlantic Petroleum sostatt í næstum at hava ein stóran kapitaltørv, og felagið fyrireikar í løtuni sína triðju partabrævaútgávu. Ætlanin er at økja partapeningin til 100 mio. kr. Á aðalfundi felagsins tann 22. juni varð samtykt at loyva útlendskum investorum at keypa partabrøv í felagnum. Partabrævaútgávan verður gjørd í samstarvi við bæði føroyskar og útlendskar bankar, og verður væntandi fyrst í komandi ári.

Umframt stjóran, Wilhelm Petersen, arbeiða í løtuni tvey fólk á skrivstovuni hjá Atlantic Petroleum í Havn. Harafturat er ein konsulentur í London knýttur at felagnum.

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni her saman við høvuðseigaranum og nevndarformanninum í Amerada Hess, John Hess á samkomu fyri løgmanni í London í februar.

Mynd Jan Müller

Rætt at fara út um landoddarnar

FØROYSKT OLJUFELAG GÓÐKENNING
Jan Müller

– At koma út um landoddarnar meti eg sum eitt stórt framstig fyri Atlants Kolvetni. Hetta sigur ein av stovnarunum og nevndarlimur í føroyska oljufelagnum, Poul Mohr, nú bretska vinnumálastýrið DTI hevur givið føroyska felagnum grønt ljós at arbeiða í bretskum øki javnbjóðis øðrum útlendskum oljufeløgum.

Poul Mohr sigur, at tað alla tíðina hevur ligið í kortunum hjá felagnum eisini at kunna menna eina føroyska oljuvinnu uttanlands. At hetta so eisini er beint í grannalagnum ella sum Poul Mohr málber seg »beint hinumegin hegnið« ger tað ikki verri. Hann sigur seg annars vera sera fegnan um at tann stóra stuðul, sum Atlants Kolvetni hevur fingið frá sínum partnarum, og her serstakliga Amerada Hess.

Simon Toole, stjóri í DTI, uttast til høgru eigur ein týðandi leiklut í at tað hevur eydnast at fáa føroyska oljufelagið góðkent at leita í bretskum øki. Her saman við Kjartan Hoydal, nevndarformanni í Atlants Kolvetni og Herálvi Joensen, aðalstjóra í Oljumálastýrinum. Teir eru stødd í London í sambandi við løgmansvitjan.

Mynd Jan Müller

Poul Mohr hevur sum nevndarlimur eisini verið við í arbeiðinum at fáa føroyska felagnum loyvi at leita eftir olju og gassi í bretskum øki. Hann dylur ikki fyri, at bretar og her serstakliga Simon Toole, stjóri í DTI hava verið ótrúliga fyrikomandi og góðir at samskifta við. Fyrst skuldu samstarvspartnararnir hjá Atlants Kolvetni, tvs. Amerada Hess, Dong og British Gas góðtaka at fáa føroyska felagið við í teirra loyvi í bretskum øki og síðani skuldi DTI góðkenna felagið.

Samtíðis sum Atlants Kolvetni hevur fingið eitt slag av altjóða góðkenning er felagið eisini við í boring á føroyska landgrunninum. Poul Mohr dugir ikki at siga, hvussu gongst, men hann heldur ikki, at føroyingar eiga at fella í fátt, um eisini henda triðja boringin verður turr. – Tað er sera bjartskygt at rokna við at finna olju bara eftir at hava borað tríggjar brunnar. Mær vitandi er tað ongantíð hent nakra aðrastaðni, at man hevur funnið olju í einum nýggjum øki við so fáum brunnum.

Hann heldur tí ikki, at vit eiga at missa mótið, um teirra boring heldur ikki gevur úrslit. Tað kann kanska fáa føroyingar, sum hava havt veruligan oljufebur, at sláa kalt vatn í blóðið og at fáa eitt meira realistiskt tilknýti til oljuna. Poul Mohr heldur ikki, at hetta kemur so óvart á oljufeløguni, sum jú eru von við slíkt og tí eisini hava hetta við í sínum metingum. Poul Mohr fer so langt sum at siga, at tað ger ikki petti, um vit ikki finna olju her og nú, tí virksemi er so stórt í samfelagnum sum er.

– Men tað eru tey, sum halda, at oljan hevði komið væl við politiskt nú undan valinum?

– Tað er spurningurin, um tað hevði verið so gott. Tað er spurningurin, um tað ikki hevði verið líka so gott tá við ongari olju í hesum umfarinum, tí tá stóð man líkasum meira á fastari grund. Poul Mohr ber eisini ótta fyri, at eitt stórt oljufund nú hevði gjørt, at fólk gjørdust frá sær sjálvum. – Alt hevði helst blivið púra vilt sum hann málber seg. Men leggur hann aftrat: – Vit leita eftir olju, tí vit halda hon er har. Fyrr ella seinni trúgvi eg vit finna hana.